# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN

# FYRI

# 2011

nov. 2010

# Viðmerkingar

# til

# RAKSTRAR- FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN

# fyri rakstrarárið 2011.

---

## INNGANGUR

Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanin fyri 2011 er í stóran mun merkt av gongdini í oljuprísum, stórum viðlíkahaldsarbeiðum, og støðugari elsølu við næstan ongum vøkstri í elnýtsluni.

Oljúútreiðslurnar eru nú áleið 40% av øllum rakstrarútreiðslunum áðrenn avskrivingar. Tí hevur prísgongdin á olju stóra ávirkan á rakstrarúrslitið.
Aftan á methøgu oljuprísirnar á sumri 2008 fullu teir aftur út á heystið, men hava síðani á sumri 2009 funnið eina legu væl hægri, enn vanligt hevur verið undan 2008. Tað er henda nýggja hægra príslegan, sum er grundarlagið undir mettu oljuútreiðslunum í 2011.
Tað eru stóru broytingarnar í oljuprísunum, sum saman við óbroyttum elprísum hava ført til 31 mió. kr. í halli í 2008, 9 mió. kr. í avlopi í 2009 og nú aftur í 2010 eitt stórt hall, munandi størri enn í 2008, kanska einar 40 – 50 mió. kr. í halli.
Umsóknirnar um loyvi at hækka elprísirnar 1. januar 2009 og 1. januar 2010 vórðu ikki gingnar á møti av eftirlitsmyndugleikanum. Nú er avtala gjørd um, at ein elpríshækking upp á 15 oyru/kWh frá 1. januar 2011 verður góðkend av eftirlitsmyndugleikanum, sum samstundis saman við SEV ásannar, at við verandi gongd í oljuprísum, - og við atliti at tørvinum at útbyggja og endurnýggja bæði á linjuøkinum og í framleiðsluni – bendir alt á, at neyðugt verður við elpríshækkingum næst komandi árini fyri at fáa javnvág í raksturin.

Framleiðsuverkini tørva av og á at verða tikin úr rakstri til størri umvælingar og hald. Talan er um kostnaðarmikið hald, sum er afturvendandi, men við fleiri ára millumbilum.
Soleiðis hevur Fossáverkið ligið stilt stóran part av 2010 til sandblásing og máling av rørum og turbinum umframt annað stórt viðlíkahalds- og umvælingararbeiði. Hettar arbeiðið aleina fer at kosta einar 16 - 17 mió. kr.
Á sama hátt er ætlanin at taka Heygaverkið úr rakstri í 2011 til viðlíkahaldsarbeiðir, sum umfata bæði byrging, rørleiðingar og sjálvt elverkið.
Hettar fer at kosta knappar 20 mió. kr. í rakstrarútreiðslum í 2011 afturat vanliga rakstrinum annars.
Tilmæli eru um frá sakkønum, nær slík arbeiði skulu gerast fyri ikki at stytta óneyðuga um livitíðina av anleggunum.
Tað ber illa til at útseta slíkt arbeiði til 2012 ella 2013, tí tá bíða aðrar líknandi uppgávur á øðrum anleggum.
Generatorurin til turbinu 1 á Fossáverkinum brendi av á heysti 2010, og kemur umvælingin av honum tí inn sum áður óvæntað útreiðsla við 0,5 mió. kr. í 2010 og 3,5 mió. kr. í 2011.

Veðurlagspolitikkur landsins og høgu oljuprísirnir skunda undir útbygging av varandi orkukeldum. Meginparturin av ætlaðu íløgunum uppá 127,3 mió. kr. í 2011 fara til útbyggingar á hesum øki, 77 mió. kr. til víðkan av Eiðisverkinum og Eiði 2 Suður, og 13,54 mió. kr. til aðrar varandi orkukeldur, herundir til forarbeiðir.
Elbrúkararnir fara í framtíðini at merkja hækkandi elprísir orsakað av kostnaðarmiklum umleggingum til meira varandi orku, men fer hettar sum frá líður eisini at virka tálmandi upp á virknaðin av høgum og óstøðugum oljuprísum.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá fortreytum og viðurskiftum, sum dentur er lagdur á í sambandi við áseting av teimum einstøku inntøku- og útreiðslubólkunum í fíggjarætlanini fyri 2011. Metingarnar byggja m.a. á lagdar ætlanir framyvir og á roknskapar- og framleiðslutøl fyrstu 9 mánaðirnar av 2010.

# INNTØKUR

Metingarnar um inntøkurnar í 2011 byggja m.a. á hesi viðurskifti:
Meðan elnýtslan vaks 2,4% frá 2007 til 2008 var ongin vøkstur frá 2008 til 2009. Árligi vøksturin er í løtuni uml. 1,4%.
Talan er um smáar broytingar í elnýtsluni, sum kunna ávirkast av t.d. virksemi á landi frá uppisjóvarfiski ella frá umleggingum frá oljufýring til hitapumpur.
Í fíggjarætlanini fyri 2011 verður roknað við 0,9% størri elnýtslu í 2010 í mun til árið fyri, og við ongum vøkstri frá 2010 til 2011.
Roknað verður við eini samlaðari avroknaðari elsølu upp á 264 mió. kWh í 2011.
Við útgangsstøði í einum meðalprísi í 2009 upp á 0,968 kr./kWh og eini príshækking upp á 0,15 kr./kWh verður samlaða inntøkan, íroknað mett fast gjald, íbindingargjald o.a. uml. 314,5 mió. kr.

# ÚTREIÐSLUR

**Rakstrarútreiðslurnar** verða vanliga býttar í tveir bólkar: Lønir til starvsfólk hjá SEV fyri seg og tilfar og tænastuveitingar fyri seg.
Hesir bólkar verða so aftur býttir millum net (býtisvirkir), framleiðsluvirksemi og fyrisiting.
Fyrisitingarútreiðslurnar hoyra sum útgangsstøði til netvirksemið, men talan er í ávísan mun um felags útreiðslur, har ein partur hoyrir til framleiðsluvirksemið.

Lønarútreiðslurnar eru mettar til 65,3 mió. kr. Hettar er uml. 0,2 mió. kr. lægri enn ásett í fíggjarætlanini fyri 2010. Roknað verður við heldur færri starvsfólkum og áleið somu lønum sum í 2010.

Tilfar og tænastuveitingar eru mettar til 86,4 mió. kr. móti 72,1 mió. kr. í fíggjarætlanini fyri 2010. Í 2010 eru íkomnar óvæntaðar eykaútreiðslur afturat teimum 11,1 mió. kr. sum vórðu avsettar til serstakar umvælingar og hald annars á Fossáverkinum soleiðis, at hesar eykaútreiðslur verða sum áður nevnt einar 16 - 17 mió kr. í 2010. Generatorhavarí á "Fossá 1", sum kom í á heysti 2010, verður umvælt í 2011, uml. 3,5 mió. kr. Henda upphædd er við í nevndu 86,4 mió. kr. eins og frammanfyri nevndu umvælingar á Heygaverkinum eisini eru við í hesum tali.

**Oljuútreiðslurnar** verða í 2011 mettar at vera 117,3 mió. kr. Tá er sum nevnt frammanfyri roknað við ongum vøkstri í framleiðsluni frá 2010 til 2011. Roknað er við eini vatnorkuframleiðslu upp á 98,5 mió. kWh, vindorkuframleiðslu uppá 7,85 mió. kWh og termiskari framleiðslu uppá 164,5 mió. kWh. Harafturat er sum nevnt roknað við keyptari vindorkuframleiðslu upp á 7,2 mió. kWh. Oljuprísirnir eru broyttir óvanliga nógv seinastu árini, bæði upp og niður, tó mest uppeftir. Á sumri 2008 vóru prísirnir komnir upp á tað hægsta nakrantíð, men komu nakað niðuraftur seinasta vetur. Síðani fóru teir nakað uppaftur og hava nú í longri tíð funnið eitt munandi hægri støði enn árini undan 2008.
Út frá meðal tungoljuprísunum fyrru helvt av oktober 2010 og út frá USD kursinum um mánaðarskiftið okt. – nov. 2010 verða oljuútreiðslurnar hjá SEV íroknað smyrji- og dieselolju mettar at vera 117,3 mió. kr. í 2011.Tá er hædd tikin fyri fráboðaða avgjaldinum til landskassan frá 1. januar 2011 uppá 10 oyru/liturin og einum oljuprísvøkstri uppá 10 % í meðal fyri árið 2011 samanborið við omanfyri nevnda prísgrundarlagið. Oljuútreiðslurnar svara til umleið 40 % av øllum útreiðslunum hjá SEV áðrenn avskrivingar í 2011. Tí fær tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísunum verður munandi annarleiðis enn tað, ið mett er í rakstrarætlanini.

**Orkukeyp og vindorkuframleiðsla**

Roknað verður við, at SEV sambært avtalu við Sp/f Røkt í Vestmanna fer at keypa vindorkuframleidda elmegi upp á uml. 7,2 mió. kWh fyri 0,40 kr./kWh.
Hettar gevur eina útreiðslu til orkukeyp upp á uml. 2,9 mió. kr.
Hædd er tikin fyri hesum orkukeypi í framleiðsluni á Sundsverkinum og harvið sparing í oljuútreiðslum. Eisini er hædd tikin fyri, at vindorkan, sum SEV sjálvt framleiðir, verður 7,85 mió. kWh í 2011.

**Rentuútreiðslur** og **avdráttir** av lánum eru mett út frá galdandi lániavtalum og ætlaðum nýggjum lánum. Roknað er við 130 mió. kr. í nýggjari lánitøku í 2011 til at fíggja íløgurnar og at hava ein hóskandi likviditet gjøgnum árið.
Talan er um netto rentuútreiðslur, har rentuinntøka av tøka peninginum er við.
Rentuútreiðslurnar eru mettar til netto 15,6 mió. kr. Hesar útreiðslur fara at hækka komandi árini, so hvørt, sum lánibyrðan veksur saman við útbyggingunum.

**Avskrivingarnar** eru settar til 60 mió. kr. út frá nýggjum avskrivingarprinsippum, og út frá uppskrivaðum ognarvirðum pr. 01.01.2009, álagt av eftirlitsmyndugleikanum.

**Íløgurnar** eru settar til 127,3 mió. kr. í 2011, harav 96,1 mió. kr. til framleiðsluvirkir og 16 mió. kr. til linjur, kaðalar og trafostøðir.
Av upphæddini til íløgur í framleiðsluvirkir eru avsettar 77 mió. kr. til Eiði 2 Suður og til 3. turbinuna á Eiðisverkinum. Hesi arbeiði vórðu sett í gerð í 2010.

**Tórshavn í november 2010**

**Elfelagið SEV**

# UPPSKOT TIL RAKSTRARÆTLAN FYRI 2011 (í 1000 kr.)

## INNTØKUR:

| Ætlan 2010: | Tillagað ætlan 2010: | | 2011: |
|---|---|---|---|
| 276.874 | 256.143 | Streymgjald | 295.647 |
| 16.369 | 16.369 | Fast gjald | 16.780 |
| 2.000 | 2.000 | Íbindingargjald | 1.000 |
| 1.755 | 1.755 | Ómaksgjøld v.m. | 1.118 |
| **296.998** | **276.267** | **Inntøkur** | **314.545** |

## ÚTREIÐSLUR:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **96.481** | **106.481** | **Olja, elverk** | | **117.301** | |
| **2.900** | **2.900** | **Orkukeyp** | | **2.900** | |
| | | Rakstrarútreiðslur: | | | |
| 25.892 | 25.892 | Framleiðsluv. v.m.,løn | 26.305 | | |
| 34.588 | 35.428 | Framleiðsluv. v.m., tilfar | 46.131 | | |
| **60.480** | **61.320** | **Framleiðsluvirkir íalt** | | **72.436** | |
| 28.168 | 27.068 | Býtisvirkir, løn | 26.582 | | |
| 18.065 | 17.219 | Býtisvirkir, tilfar | 19.685 | | |
| **46.233** | **44.287** | **Býtisvirkir íalt** | | **46.267** | |
| 12.505 | 12.505 | Fyrisiting v.m., løn | 12.405 | | |
| 19.470 | 19.470 | Fyrisiting, tilfar | 20.610 | | |
| **31.975** | **31.975** | **Fyrisiting íalt** | | **33.015** | |
| **9.567** | **9.897** | **Renta, netto** | | **15.558** | |
| **247.636** | **256.860** | **Rakstrarútreiðslur íalt** | | | **287.477** |
| **49.362** | **19.407** | Úrslit áðrenn avskrivingar | | | **27.068** |
| | | | | | |
| **56.000** | **56.000** | **Avskrivingar, rakstrargøgn** | | **60.000** | |
| | | | | | **60.000** |
| | | | | | |
| **6.638** | **36.593** | **Rakstrarúrslit** | | | **-32.932** |
| ===== | ===== | | | | ===== |

# UPPSKOT TIL FÍGGJARÆTLAN FYRI 2011 (í 1.000 kr.)

| Ætlan 2010: | Tillagað ætlan 2010: | | | 2011: |
|---|---|---|---|---|
| 49.363 | 19.407 | Gjaldførisískoyti frá rakstrinum | | 27.068 |
| - 500 | - 500 | Broyting, skuldarar, ognarar, goymslur | | - 500 |
| 48.863 | 18.907 | | | 26.568 |
| 121.893 | 108.343 | Íløgur | 127.339 | |
| 79.000 | 90.000 | Lántøkur | 130.000 | 2.661 |
| 5.970 | 564 | | | 29.229 |
| 19.000 | 19.000 | Goldnir avdráttir | | 19.598 |
| - 13.030 | 18.436 | | | 9.631 |
| 54.937 | 36.772 | Ágóði við ársbyrjan (meting) | | 24.000 |
| **41.907** | **18.336** | **Ágóði við ársenda** | | **33.631** |

# UPPSKOT TIL ÍLØGUÆTLAN 2011 (í 1.000 kr.)

| | Ætlan 2010: | Tillagað ætlan 2010: | | 2011: |
|---|---|---|---|---|
| 1. | 15.400 | 15.400 | Býtisvirkir | 16.000 |
| 2. | 89.450 | 79.900 | Framleiðsluvirkir | 96.133 |
| 3. | 5.878 | 2.378 | Bygningar, koblingsstøðir v.m. | 2.100 |
| 4. | 11.165 | 10.665 | Nýútvegan | 13.106 |
| | **121.893** | **108.343** | **Íalt** | **127.339** |
| | ====== | ===== | | ====== |

# ÚTGREINING AV ÍLØGUÆTLANINI 2011:

| **Býtisvirkir:** | | (í 1.000 kr.) |
|---|---|---|
| Trafostøðir 0,4, 10, 20 og 60 kV og íkomin mál | | **16.000** |
| **Framleiðsluvirkir:** | | |
| 1. | Eiðisverkið, 3. turbinan | 34.000 |
| 2. | Eiðisverkið, Eiði 2 Suður | 43.000 |
| 3. | Varandi orka | 8.000 |
| 4. | Sund, st. 3, fyrireiking og proj. | 3.000 |
| 5. | Sundsverkið, dagtangagarður | 1.000 |
| 6. | Elverk, ymiskt og smáverk + maskindeildin | 7.133 |
| | **Íalt** | **96.133** |
| | | ====== |
| **Koblingsstøðir bygningar o.a.** | | |
| 1. | Nýggj koblingsstøð í Vestmanna | 500 |
| 2. | Annað | 600 |
| 3. | Bygningsvíðkan í Tórshavn | 500 |
| 4. | Hølisviðurskifti, málaragoymsla keyp/søla v.m., VN | 500 |
| | **Íalt** | 2.**100** |
| | | ==== |
| **Nýútvegan, ymiskt:** | | |
| 1. | Amboð v.m. býtisvirkir | 1.000 |
| 2. | Amboð v.m. Annað | 200 |
| 3 | Innbúgv o.a. | 500 |
| 4. | Akfør | 1.000 |
| 5. | KT útgerð | 1.500 |
| 6. | Fjaravlestur, málarar og málitól v.m. | 3.366 |
| 7. | GRANI | 5.040 |
| 5. | Menningar- og granskingargrunnur | 500 |
| | **Íalt** | **13.106** |
| | | ===== |

## GJALDSKRÁIN (oyru/kWh):

| **Brúkarastødd** (kWh/ár): | **01.01-2011**<br>**Fast gjald** (kr./ár): | **01.01.2011:**<br>**Nýtslugjald** (kr./kWh): | **01.01.2008 + 2009 + 2010:**<br>**Nýtslugjald** (kr/kWh): |
|---|---|---|---|
| Upp til 10.000 | **480,00** | **1,36** | **1,21** |
| 10.000 til 100.000 | **1.280,00** | **1,28** | **1,13** |
| yvir 100.000 | **5.280,00** | **1,24** | **1,09** |
| Ídn. yvir 20.000 | **9.080,00** | **0,89** | **0,74** |

Afturat omanfyri nevndu gjøldum verður roknað MVG.